# Landsstýrið aftur klagað fyri Løgtingsins Umboðsmanni

**Tað eru skjótt 10 mánaðir síðani, at Føroya Arbeiðarafelag skrivaði landsstýrinum bræv, men enn hevur felagið ikki hoyrt eitt orð aftur**



*Føroya Arbeiðarafelag ætlar at lyfta húsini upp, men tað gongur so strilti, at málið nú endar hjá Løgtingsins Umboðsmanni*

ALMENN UMSITING
*Áki Bertholdsen*

Nú verður Landsstýrið eftir øllum at døma aftur klagað fyri Løgtingsins Umboðsmanni.

Hesuferð er tað Føroya Arbeiðarafelag, sum fer at klaga Landsstýrið.

– Vit hava ikki tikið endaliga støðu í nevndini í Føroya Arbeiðarafelag, men tað er onki at gera, uttan at venda sær til Løgtingsins Umboðsmann, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Orsøkin til klaguna er, at Føroya Arbeiðarafelag ikki enn hevur fingið svar uppá eitt bræv, sum felagið sendi landsstýrinum fyri níggju mánaðum síðani.

– Vit kunnu ikki liva við, at tað skulu ganga níggju mánaðir frá tí at vit senda landsstýrinum eitt bræv, hóast vit hava mint tey á tað og tí eru vit noydd at fara víðari við málinum og leggja tað fyri Løgtingsins umboðsmann, sigur Ingeborg Vinther.

## Sleppa ikki at byggja

Brævið, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur sent landsstýrinum, er ein kæra til Kommunala Eftirlitið um viðferðina, sum felagið hevur fingið frá Tórshavnar Býráð.

Føroya Arbeiðarafelag ætlar nevniliga at byggja hølini í Tjarnardeild í Havn, út.

Í húsinum er ein fundarsalur við plássi til eini 120 fólk, men tað, sum felagið ætlar, er at lyfta skráveggirnar í húsinum upp, so at fundarsalurin verður størri og at pláss verður fyri einum 170 fólkum.

– Síðani sendu vit bygginevndini í Tórshavnar kommunu tekningar og byggiætlan.

– Men tá fingu vit at vita,at grundstykkið var ov lítið, við tað at húsið bleiv hægri.

Hon sigur, at so varð stykkið niðan fyri húsið matrikkulerað afturat húsinum. Tað var einar 1200 fermetrar til støddar. Ingeborg Vinther sigur, at tilsamans er ognin hjá Føroya Arbeiðarafelagvið Tjarnardeild yvir 5.000 fermetrar.

– So varð aftur skrivað til Tórshavnar Býráð, men einaferð enn var svarið nei: Nú skuldi húsið vera ov høgt eftir byggisamtyktini.

Ingeborg Vinther sigur, at tískil klagaði Føroya Arbeiðarafelag Býráðið fyri kommunala eftirlitinum hjá Landsstýrinum.

– Vit halda ikki, at tað bar til fyrst at siga, at stykkið var ov lítið, og síðani at skylda upp á byggisamtyktina.

– Men nú hevur so kæran ligið í Landsstýrinum í níggju mánaðir og vit hava ikki frætt eitt orð aftur, hóast rykt hevur verið eftir svari, og nú eru einastu ráðini at fara til Løgtingsins umboðsmann, sigur Ingeborg Vinther.

Hetta verður ikki fyrstu ferð, Landsstýrið verður klagað fyri Løgtingsins Umboðsmanni. Vinnumálastýrið fekk álvarsliga átalu í sambandi við Landsverkfrøðingin. Og eisini Fiskimálastýrið hevur fingið eina átalu í einum máli um ræðisrættini, men gekk eisini frítt í einum máli um veiðo- og fiskiloyvi. Samstundis hevur Fíggjarmálastýrið eisini fingið nøkur orð við á vegnum í sambandi við munarløn.

# Øll skipini fáa loyvi at sigla við sjúklingum

**Skipara- og Navigatørfelagið linkar nú verkfallið so at øll skipini fáa undantaksloyvi at røkja sjúkraflutning**



VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Tá ið verkfall er, plaga fakfeløg viðhvørt at herða tiltøkini fyri at leggja størri trýst á mótpartin.

Men, nú Skipara og Navigatørfelagið er farið í verkfall, hevur tað gingið øvugta leið.

Tá ið verkfallið varð lýst á miðdegi hósdagin, var samstundis lýst við, at Teistin og Ternan høvdu undantaksloyvi at røkja sjúkraflutning um ávikavist Skopunarfjørð og Vestmannasund.

Men nú hevur Skipara- og Navigatørferlagið eisini lýst, at øll skipini hava fingið undantaksloyvi til at røkja sjúkraflutning.

Sostatt eru manningarnar á øllum Strandfaraskipunum aftur umborð, til reiðar at sigla við sjúklingum, skuldi tað gjørst neyðugt.

Onkur smábátur hevur verið brúktur til sjúkraflutning um Leirvíksfjørð, men Skipara- og Navigatørfelagið hevur nú gjørt vart við, at øll skipini, og sostatt eisini tað um Leirvíksfjørð, hevur undantaksloyvi at sigla við sjúklingum og læknum og at øki ikki longu er verkfalsrakt.

Skipara- og Navigatørfelagið hevur sostatt víðka undantaksloyvini til at umfata øll skip, hóast ósemja er, hvørja samsýning, yvirmenninir skulu hava, fyri at vera til reiðar.

Fíggjarmálastýrið tvíheldur um, at menninir fáa bara gjaldið fyri tilkallivaktir, sum er 17 krónur um tíman yrkadagar og 34 krónur um tímar sunnu- og halgidagar.

Hinvegin tvíheldur Skipara- og Navigatørfelagið um, at menninir skulu hava vanliga løn tað tíðina, skipið átti at siglt eftir ferðaætlanini og at gjaldið fyri tilkalling er bara galdandi um kvøldið og um náttina, tá ið skipið annars liggur.

Og nú Skipara- og Navigatørfelagið hevur víðka undantaksloyvið til sjúkraflutning til at umfata øll skip, er kravið framvegis, at yvirmenninir skulu hava vanliga løn.

Ellintur Abrahamsen sigur, at tilsamans eru tað 20-25 mans, sum eru í verkfalli og á miðdegi í gjár hevði enn onki samband verið ímillum partarnar.



# Landsroknskapurin gav avlop

**Tíðindaskriv**

Hóast roknskaparskipan landsins hevur verið umløgd í vetur, hevur arbeiðið at gera roknskapin fyri 2001 gingið somikið væl, at roknskapurin nú er greiður til prentingar.

Ymisk roknskaparúrslit hava seinastu tíðina verið nevnd í fjølmiðlunum. Hetta er orsøkin til hesa almennu kunning um landsroknskapin fyri 2001.

**Roknskapaarúrslitið**
Roknskapurin vísir eitt RLÚ- avlop uppá 697 mió. krónur Hetta er størsta roknskaparavlop landið nakrantíð hevur havt.

Roknskaparárini 1997 - 2001 góvu hesi RLÚ - úrslit :

| | | |
|---|---|---|
| 1997 | 178 | mió. kr. |
| 1998 | 471 | mió. kr. |
| 1999 | 648 | mió. kr. |
| 2000 | 602 | mió. kr. |
| 2001 | 697 | mió. kr. |

**Inntøkur og útreiðslur**
Inntøkur landskassans frá skattum og avgjøldum vóru 2.805 mió krónur móti 2.515 mió krónum í ár 2000 hetta svarar til ein vøksur uppá 11,5 %.

Ríkisveitingin var 995 mió krónur móti 973 mió krónum í ár 2000. Vøksturin var 2,3 %.

Útreiðslurnar vóru 3.102 mió krónur móti 2.886 mió krónum í ár 2000. Vøksturin var 7,5 %.

**Nýtslan av roknskaparavlopinum**
Av roknskaparavlopinum uppá 697 mió. krónur er meginparturin ella 562 mió krónur nýttar til at økja um gjaldføri landskassans. 144 mió krónur eru tó nýttar til afturgjald av landkassaskuld.

**Gongdin higartil í ár 2002**
Fíggjarlógin fyri 2002, ið Løgtingið samtykti í desember 2001 vísti eitt RLÚ-avlop uppá 121 mió krónur.

Higartil í ár hevur Løgtingið givið eykajáttanir fyri tilsamans 50 mió krónur og skattalættar, ið enn ikki eru tiknir við á eykajáttan uppá 27 mió krónur.

Mótsattan veg telur, at skatta og avgjaldsinntøkur landskasans higartil í ár hava verið væl hægri enn mett var, tá fíggjarlógin var gjørd.

Tey seinastu inntøkutølini, ið vóru kend tá fíggjalógin endaliga var avgreidd í Løgtinginum vóru inn-tøkurnar fyri oktober mánað 2001. Teir 5 mánaðirnir nov. 2001–mars 2002, sum síðan eru gingnir, hava víst ein óvanliga stóran vøkstur í serliga skattainntøkunum. Skattainntøkurnar eru hetta 5-mánaðarskeið 16,8 % hægri enn skattainntøkurnar tilsvarandi 5-mánaðarskeið eitt ár frammanundan. Út frá hesum grundarlagi kann roknast við at inntøkurnar í 2002 koma at verða einar 100 - 150 mió krónur hægri enn mett er á fíggjarlógini.

# Stórfingið tónleikatiltak í Havn

**Árliga musikkstevnan verður í Havn í døgunum 26.-27. apríl 2002**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



Musikkstevnan 2002 verður í hildin í Havn Dýra Biðidag 26. apríl og leygardagin 27. apríl. Musikkstevnan er ein árlig afturvendandi stevna fyri blásiorkestur í Føroyum. Orkestrini skiftast um at skipa fyri stevnuni, og í ár er tað Harmoniorkestrið GHM, sum er vertur.

Eitt av endamálunum við stevnuni er at geva spælarum úr ymsu orkestrunum høvi til at hittast og læra hvønn annan betur at kenna. Á stevnuni í ár verður stórur dentur lagdur á venjingar og framførslu hjá einum stórum felagsorkestri. Í hesum sambandi hava spælararnir úr ymsu orkestrunum eitt serstakliga gott høvi til at læra av hvørjum øðrum, og fáa nýggjan íblástur til at menna seg tónleikaliga.

Eitt annað endamál við stevnuni er, at gera vart við tónleikin úti ímillum fólk. Á stevnuni í ár er nógv gjørt fyri, at havnarfólk skulu merkja, at stevna er í býnum. Skipað verður fyri útikonsertum ymsa staðni í býnum seinnapartin Dýra Biðidag. Frá ymsu konsertstøðunum úti í býnum fara orkestrini at ganga í skrúðgongu oman í miðbýin, har øll orkestrini fara at møtast til felagskonsert á Tinghúsvøllinum. Í sambandi við hesa konsertina, fer Jan Christiansen borgarstjóri at seta Musikkstevnuna 2002.

Sjey orkestur hava boðað frá luttøku á Musikkstevnuni 2002. Tey eru Klaksvíkar Hornorkestur, Fuglafjarðar Hornorkestur, Nes Sóknar Musikkfelag, Havnar Hornokestur, Tvøroyrar Hornorkestur, eitt samansett orkestur við luttøku av limum úr Vestmanna Hornorkestri og Sørvágs Tónleikarfelag og endiliga Harmoniorkestrið GHM.

Skráin fyri stevnuna byrjar Dýra Biðidagsmorgun við felagsvenjingum til stóra felagsorkestrið. Seinnapartin Dýra Biðidag vera nakrar stuttar útikonsertir hildnar við Háskúlan, ovarliga á Dalavegnum og á Láarvegnum. Úr hesum støðum verður gingið í skrúðgongu oman á Tinghúsvøllin, har Musikkstevnan 2002 verður sett. Ein felagskonsert verður eisini á Tinghúsvøllinum tá.

Um kvøldið Dýra Biðidag verður almenn kvøldseta í Norðurlandahúsinum, við tónleiki, sangi, dansi og undirhaldi. Til kvøldsetuna eru tey luttakandi orkestrini, biðin um at koma við eini »ótraditionellari« skrá, so tað er sera spennandi, hvat kemur burturúr. Á kvøldsetuni luttaka eisini Havnar Ungdómshornorkestur, Næmingaorkestrið hjá Musikkskúlanum og Ælabogin, sum er orkestrið hjá teimum menningartarnaðu.

Leygardagurin 27. apríl byrjar við venjingum hjá einstøku orkestrunum, og hjá stóra felagsorkestrinum. Klokkan 15:00 leygardagin verður stórfingin Gallakonsert í Norðurlandahúsinum, har einstøku orkestrini fara at spæla hvørt sær, umframt at stóra felagsorkestrið fer at hava framføra eina fjølbroytta skrá. Leygarkvøldið endar Musikkstevnan 2002 við stórari veitslu fyri øllum stevnuluttakarunum.

Musikkstevnan hevur verið hildin á hvørjum árið síðani 1966 og er henda musikkstevnan tískil tann 37. í røðini.

**Skráin fyri stevnuna sær soleiðis út:**
Dýri Biðidagur 26. apr. 2002
Kl. 10.00 Orkestrini møta í Norðurlandahúsinum til felagsvenjing.
Kl. 15.00 Útikonsertir á hesum støðum í býnum:
Við Háskúlan, við krossin Dalavegur/ Pedda við Steinsgøta og á Láarvegnum.
Kl. 15.30 Skrúðgongur frá konsertstøðunum móti miðbýnum.
Kl. 16.00 Konsert á Tinghúsvøllinum. Jan Christiansen borgarstjóri setur stevnuna.
Kl. 19.30 Almenn kvøldseta í Norðurlandahúsinum.

**Leygardagur 27. apr. 2002**
Kl. 10.00 Felags- og orkesturvenjing
Kl. 15.00 Galla konsert í Norðurlandahúsinum

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Nissan Almera 2,0 Diesel GX
gráur, 4 hurðar,
árg. 1997, 151.000 km.
94.000

Nissan Primera 1,6 LX
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
69.000

Nissan Primera 2,0
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
47.000

Nissan King Cab 4x4 Diesel
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
78.000

Peugeot 206 XR 1,9 D
bronze, 5 hurðar,
árg. 1999, 88.000 km.
110.000

Peugeot 306 XS 2,0 St. Car
Ljósa bláur, 5 hurðar,
árg. 1999.
130.000

Peugeot 306 Diesel Aircon
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 47.000 km.
125.000

Opel Astra 1,6
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000

Opel Astra 1,6 Club Wagon
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 110.000 km.
55.000

Opel Astra 1,7Dtl
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
99.000

Opel Astra 1,8 Club Wagon
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 104.000 km.
70.000

Opel Astra 2,0 Dti Wagon
gráur, 5 hurðar,
árg. 1998, 76.000 km.
130.000

Opel Astra 1,7d Wagon
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 142.000 km.
55.000

Opel Astra 1,7d Wagon
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 99.000 km.
65.000

Opel Astra 1,6 Club Wagon
brúnur, 5 hurðar,
árg. 1997, 40.000 km.
85.000

Opel Vectra 1,4
hvítur, 4 hurðar,
26.000

Opel Vectra 2,0 CD
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 48.000 km.
134.000

Saab 900 S
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 119.000 km.
98.000

Ford Fiesta
bláur, 5 hurðar,
130.000 km.
10.000

Mazda 323 F 1,6i GLX
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 116.000 km.
65.000

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin